Søgu- og samfelagsdeildin
Faculty of History and Social Sciences

# B.A. í søgu (Smátjóðir og altjóðagerð

## Skeiðslýsing

| | |
|---|---|
| Skeiðsnummar | 2023.14 |
| Heiti | Eldri heimssøga |
| ECTS | 10 |
| Endamál | At veita teimum lesandi grundleggjandi kunnleika til heimssøguna í miðøld og fram til umleið 1750, við serligum denti á evropeiskari og evropeiskt sprotnari søgu<br>Skeiðið vendir sær eisini til fólk, sum hava almennan áhuga í søgu. |
| Innihald | Tey lesandi fáa gjøgnum skeiðið breiðan kunnleika til grundleggjandi samanhangir í heimssøguni í miðøld og fram til 1750 og vitan um grundleggjandi samfelagsviðurskifti í evropeisku samfeløgunum í tíðarskeiðinum. Dentur verður lagdur á at geva teimum lesandi kunnleika til dygdargóðar fakligar bókmentir um evnið, umframt førleikar til at miðla hesa vitan til onnur |
| Læru- og undirvísingarhættir | Skeiðið er umleið 30 tímar. Undirvísingin verður skipað sum fyrilestrar, framløgur og kjak. Tey lesandi skulu við skeiðsbyrjan velja sær eitt evni, sum tey skulu fyrireika seg uppá at hava framløgu um fyri restina av flokkinum. Framløgan er ein treyt fyri at sleppa upp til próvtøku í fakinum |
| Læruúrtøka | Tá skeiðið er liðugt skulu tey lesandi:<br>• hava eina breiða fatan av søgugongdini í miðøld og fram til umleið 1750<br>• vera før fyri at orða grundleggjandi spurningar í evropeiskari søgu áðrenn 1750<br>• sjálvstøðugt megna at víðka um sjónarringin og ogna sær nýggja vitan um evnið. |
| Próvtøkuháttur | Munnlig próvtøka við uttanseturs próvdøming eftir galdandi próvtalsstiga. Fyri at sleppa til próvtøku skal tann lesandi hava hildið eina framløgu (sí undir Læru- og undirvísingarhættir) fyri flokkinum. |
| Próvdøming | Uttanhýsis |
| Próvtalsstigi | 7-talsstigin |
| Lestrarlisti | Pensum er umleið 1000-1500 síður. |
| Ábyrgd | Erling Isholm |